## Marner Joensen og Maria Hansen føroyameistarar í bridge

Um vikuskiftið var føroyameistarakapping í bridge fyri blandaði pør í Bridgehúsinum í Havn. Talan gjørdist um eina spennandi kapping. Marner Joensen og Maria V. Hansen vunnu kappingina við 30 stigum. Hetta vóru bert fimm fleiri enn Anna Olsen og Heðin Mouritsen fingu. Aftur til triðja parið var heldur longri. Henriette Svenstrup og Oddmar Nielsen fingu bara seks stig. Kappingin var leygardagin



## Veterankapping í bridge

Jens Pauli Nolsøe og Danny Danielsen kunnu nú kalla seg føroyameistarar fyri veteranar í bridge. Henda heiður vunnu teir sær sunnudagin, tá føroyameistararnir í bridge fyri veteranar skuldi avgerast. Vinnararnir fingu 39 stig. Hetta vóru nøkur fleiri, enn Johannes Skaarup og Marner Joensen fingu. Teir fingu 25 stig. Hørð kapping var um annað plássið, tí Atli Hansen og Jógvan Ranghamar fingu 23 stig, og endaðu sostatt á øðrum pássi.

# Helgi gull verdur sum fyrimynd

**Formaðurin í Talvsambandi Føroya, Jógvan Joensen, heldur tað hava sera stóran týdning fyri eitt so lítið land sum Føroyar, at vit hava ein ungan undangongumann í Helga Dam Ziska, sum um vikuskiftið fyri aðru ferð gjørdist norðurlendskur meistari í ungdómstalvi**



*Tríggir fegnir menn avmyndaðir í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið. Frá vinstru eru teir formaðurin í Talvsambandi Føroya, Jógvan Joensen, norðurlendski meistarin í U20-bólkinum, Helgi Dam Ziska, og dómarin í kappingini, Finnbjørn Vang*

*Mynd: Talvsamband Føroya*

TALV
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í bæði norðurlendskum og altjóða høpi eru Føroyar ein lítil tjóð, men tá vit tosa um talv, so eru Føroyar ikki so líitlar longur. Orsøkin til tað er fyrst og fremst ein ungur maður: Helgi Dam Ziska.

Tá hann leygardagin fyri aðru ferð vann eina kapping um norðurlendska meistaraheitið í talvi, flutti hann samstundis Føroyar og føroyska telving fleiri leikir fram á norðurlendska talvborðinum, har hini nú ikki longur kunnu taka sum givið, at Føroyar skulu vera »prügelknabe«.

– Vit hava sjálvandi vitað, at Helgi er ein góður og evnaríkur telvari, tí tað hava úrslitini hjá honum víst nú í fleiri ár. Men tað er altso einastandandi væl klárað, at hann nú eisini hevur megnað at vunnið okkum gull í tí elsta bólkinum í NM-kappingini, staðfestir ein fegin formaður í Talvsambandi Føroya, Jógvan Joensen.

– Ikki minst er hetta sjálvandi ein persónligur varði hjá Helga, tí teir bestu í U20-bólkinum vóru nokk so javnir. Eg hevði væntað, at Helgi fór at standa seg væl, men at hann skuldi taka gullið, er bara heilt fantastiskt – bæði fyri hann sjálvan og fyri føroyska telving sum heild.

### Ein góð fyrimynd

Talvformaðurin vísir eisini á, at hóast Helgi við sínum 18 árum enn telist millum teir ungu telvararnar, so hevur hann sera nógv at siga fyri teir, sum eru yngri enn hann, tí hann er ein so góð fyrimynd fyri teir í allar mátar.

– Tað, at teir yngru hava ein sum Helga at síggja upp til, hevur sera nógv at siga fyri ungdómstelvingina, og hetta er eisini nakað, fleiri av hinum norðurlondunum misunna okkum, tí tey ikki í sama mun hava nakran, sum kann lyfta hini upp við sær, sigur hann.

– Svenskararnir hava sjálvandi Nils Grandelius, ið vann U16-bólkin sera sannførandi, men har er líkasum eingin annar. Og ein so sterk talvtjóð sum Ísland eigur í løtuni ongan, sum kann hava sama týdning fyri teirra ungdómsarbeiði, sum Helgi hevur tað fyri okkara. Tað sama er galdandi fyri hini norðurlondini, so vit kunnu bara fegnast um, at vit eiga henda fyrimunin.

Jógvan Joensen væntar, at góða úrslitið hesa ferð kann hava við sær, at áhugin fyri talvi millum tey ungu fer at økjast enn meira, og hann sigur seg vera sannførandan um, at avleiðingarnar av sigrinum hjá Helga hesa ferð fara at síggjast aftur í komandi avrikum.

### Hini skulu nokk koma

Umframt avrikið hjá Helga Dam Ziska, so hevði eisini ein annar av yngru føroysku telvarunum eitt sera gott úrslit í kappingini. Tað var Rógvi Egilstoft Nielsen úr Sandavági, sum gjørdist nummar fýra í næstelsta bólkinum, U16.

– Rógvi hevði eisini eina øgiliga góða kapping, og úrslitið hjá honum er eisini sera gott. Samanumtikið haldi eg tað vera nokk so stuttligt at síggja, at tað eru í teimum báðum elstu bólkunum, at vit fáa tey bestu úrslitini hesa ferð, sigur Jógvan Joensen.

– Gamaní komu kanska ikki so øgiliga nógv stig hjá teimum yngru, men har var nógv nýtt fólk við hesa ferð, og nú hava tey so roynt hesa kappingina og kunnu brúka tær royndirnar næstu ferð. Vit vita, at tey hava dygdir, sum eisini í komandi árum kunnu geva okkum góð úrslit í norðurlendskum høpi, og vit skulu bara geva teimum ta tíðina, ið skal til.

Til stuttleikar kann nevnast, at tá Føroyar fyrstu ferð vóru vertir fyri kappingini um norðurlendsku meistaraheitini í 2003, var ein av yngstu føroysku telvarunum Helgi Dam Ziska. Og ta ferðina vann hann einki…

## NM-kappingin – endaliga støðan

**U20**

| Nr. | Navn | Land | Rating | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | IM Helgi Dam Ziska | Føroyar | 2420 | 5 |
| 2 | IM Erik Blomqvist | Svøríki | 2435 | 5 |
| 3 | Teemu Pudas | Finland | 2176 | 4 |
| 4 | Morten Storgaard | Danmark | 2058 | 3½ |
| 5 | Nicolai Getz | Norra | 2190 | 3 |
| 6 | Atli F. Kristjánsson | Ísland | 2105 | 3 |
| 7 | Sverrir Torgeirsson | Ísland | 2094 | 3 |
| 8 | Rasmus Petersen-Lund | Danmark | 1758 | 2½ |
| 9 | FM Drazen Dragizevic | Svøríki | 2321 | 2½ |
| 10 | Kristoffer Madland | Norra | 1992 | 2½ |
| 11 | Pekka Koykka | Finland | 2176 | 2 |
| 12 | Margar Berg | Føroyar | 1625 | 0 |

**U16**

| Nr. | Navn | Land | Rating | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | IM Nils Grandelius | Svøríki | 2464 | 5½ |
| 2 | Roope Kiuttu | Finland | 2107 | 5 |
| 3 | Hjörvar Grétarsson | Ísland | 2279 | 4 |
| 4 | Rógvi Egilstoft Nielsen | Føroyar | 1894 | 3 |
| 5 | Joachim B. Nilsen | Norra | 1988 | 3 |
| 6 | Henri Pohjala | Finland | 2118 | 3 |
| 7 | Patrekur M. Magnússon | Ísland | 1902 | 2½ |
| 8 | Mads Hansen | Danmark | 2062 | 2½ |
| 9 | Jon Kristian Haarr | Norra | 2034 | 2½ |
| 10 | Johan Hansson | Svøríki | 1953 | 2 |
| 11 | Mads Jensen | Danmark | 1832 | 2 |
| 12 | Hjalti Toftum Jógvansson | Føroyar | 1832 | 1 |

**U14**

| Nr. | Navn | Land | Rating | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Philip Lindgren | Svøríki | 2000 | 5 |
| 2 | Mads Andersen | Danmark | 2190 | 4½ |
| 3 | Kristian Seegert | Danmark | 2101 | 4 |
| 4 | David Lange | Norra | 1988 | 3½ |
| 5 | Nikita Smirnov | Svøríki | 1597 | 3½ |
| 6 | Nökkvi Sverrisson | Ísland | 1640 | 3 |
| 7 | Jathavan Suntharalingam | Norra | 1959 | 3 |
| 8 | Dagur Andri Friðgeirsson | Ísland | 1787 | 3 |
| 9 | Erik Ronka | Finland | 2040 | 2½ |
| 10 | Aapo Sassi | Finland | 1778 | 2 |
| 11 | Pætur Poulsen | Føroyar | 1238 | 1½ |
| 12 | Einar Gregersen | Føroyar | 1235 | ½ |

**U12**

| Nr. | Navn | Land | Rating | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Peter Flermoen | Norra | 2006 | 5 |
| 2 | Antti Uusitupa | Finland | 1716 | 5 |
| 3 | Friðrik T. Stefánsson | Ísland | 1640 | 4 |
| 4 | Daniel Ebeling | Finland | 1795 | 3½ |
| 5 | Mads-Holger Jacobsen | Danmark | 1833 | 3½ |
| 6 | Torgeir Kjøita | Norra | 1367 | 2½ |
| 7 | Martin Lokander | Svøríki | 1643 | 2½ |
| 8 | Tobias Juul Madsen | Danmark | 1778 | 2½ |
| 9 | Emil Sigurðarson | Ísland | 1540 | 2½ |
| 10 | Høgni Egilstoft Nielsen | Føroyar | 1833 | 2½ |
| 11 | Heðin Gregersen | Føroyar | 1345 | 1½ |
| 12 | Filip Johansson | Svøríki | 1309 | 1 |

**U10**

| Nr. | Navn | Land | Rating | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Lars Oskar Hauge | Norra | 1054 | 4½ |
| 2 | Aryan Tari | Norra | 1878 | 4½ |
| 3 | Kunal Bhatnagar | Svøríki | 1542 | 4½ |
| 4 | Qiyu Zhou | Finland | 1666 | 4½ |
| 5 | Oliver Aron Jóhannesson | Ísland | - | 3½ |
| 6 | Jón Kristinn Torgeirsson | Ísland | - | 3 |
| 7 | Troels B. Andersen | Danmark | 1119 | 3 |
| 8 | Tór Kristian Joensen | Danmark | 1218 | 3 |
| 9 | David Nordin | Svøríki | 1133 | 2½ |
| 10 | Silas Eyðsteinsson | Føroyar | - | 2 |
| 11 | Julian Gregersen | Føroyar | 1000 | 1 |
| 12 | Janus Skaale | Føroyar | - | 0 |